# Fleyr, fyrsta felag, ið bert íðkar flogbólt



Ungir havnamenn eru gingir saman og hava stovnað flogbóltsfelagið Fleyr. Hetta er fyrsta ítróttafelag í Føroyum, sum er stovna til einans at íðka flogbólt.

Stovnararnir høvdu sent umsókn inn til ÍSF og biðið um upptøku í Ítróttasambandið. Umsóknin var fyri á stjórnarfundinum 10. juni og varð hon gingin á møti.

Millum teirra sum stovnaðu hetta felagið eru kendir flogbóltsmenn, m.a. Gordon Eidisgaard og Finnbogi Arge, ið báðir spældu við FS seinasta kappingarár.

Í teimum lógum, sum vórðu samtyktar á stovnandi aðalfundinum 4. mai, stendur m.a. at endamál felagsins er at íðka flogbólt og fremja áhugan fyri hesi ítróttargrein millum ungfólk í Føroyum.

Limagjaldið er 20 krónur um mánaðin fyri vaksin og 15 krónur um mánaðin fyri unglingar. ★